## Ph.D. innan vísindi

Høgni Hammershaimb Debes fer tann 20. juni at verja Ph.D. ritgerð innan vísindi. Høgni hevur granskað í gróðri og djóraplankton, eins og hann hevur kannað sambandið millum plantuætið og djóraæti á landgrunninum. Í dómsnevndini sita Dr. Roger Harris, Plymouth Marina Laboratory, Dr. Fransisco Rey, Havforskningsinstituttet i Bergen og Jan Arge Jacobsen, Dr. Scient, granskari á Fiskirannsóknarstovuni. Verjan er almenn, og fer hon fram á Føroya Sjómansskúla klokkan 13.00.



## Vantandi arbeiði hóttir

Arbeiðsgevarar vilja hava betri atongd til útlendska arbeiðsmegi. Hetta verður staðfest í ársfrágreiðiingini til aðalfundin hjá FAG. – Størsta hóttanin fyri framhaldandi vælferð okkara er trotið av arbeiðsmegi. Uttan arbeiðsmegi ber ikki til at skapa virðir í samfelagnum, verður millum annað staðfest. Eisini verður sagt, at tað ikki er nóg mikið, at politiski myndugleikin arbeiðir við at geva betri atgongd til ES-borgarar. Hetta tí trot á arbeiðsmegi eisini ger seg galdandi í júst ES-londunum.

# meint



*Vár í Gong, forkvinna hjá sjúkrasystrunum, heitir á myndugleikarnar um at taka ein flokk inn á Sjúkrasystraskúlan afturat árliga*

flokk afturat inn árliga.

Allan Skaalum sigur, at óansæð hvat, so eiga vit at útbúgva fleiri heilsustarvsfólk.. Ikki minst tí, at samstundis sum fólk gerast alt eldri, hækkar eftirspurningurin í heilsuverkinum eisini.

- Felagið metir hetta verða eitt tekin til myndugleikarnar um at taka trupulleikan í álvara, og síggja til, at ein flokkur av lesandi verður tikin inn afturat árliga, sigur felagið hjá sjúkrasystrunum.

Og Jón á Steig endar við at upplýsa, at nóg nógvir umsøkjarar eru, so tað átti ikki at verið trot á sjúkrasystrum, um nóg nógv vórðu tikin inn á skúlan.

Bæði Allan Skaalum, Jón á Steig og Vár í Gong enda við at staðfesta, at í síðsta enda er tað sjúklingurin, sum er taparin.

# Trupult at fáa avloysarar

**Alt tað bráneyðuga verður gjørt, men tað, ið vanliga verður planlagt, má víkja. Hetta merkir so eina longda bíðitíð, men tað er kortini so, at viðurskiftini eru ráðilig, sigur Allan Skaalum, sjúkrahússtjóri**

HEILSURØKT
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vanliga hevur tað verið so, at Landssjúkrahúsið hevur fingið hópin av umsóknum, tá frítíðaravloysarar skulu setast í starv, men í ár hevur tað verið ein trupulleiki.

Aktiviteturin er eisini vanliga lægri summarmánaðirnar, men í ár er trot á starvsfólki, og tí verður bert tað bráneyðuga gjørt.

- Tað merkir, at alt, sum vit vanliga mugu planleggja, verður útsett, til søðan aftur er normal, sigur Allan Skaalum.

Tað hevur verið serliga trupult at fáa avloysarar í ár, og tað er galdandi fyri nærum allar starvsfólkabólkar. Bæði læknar, sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar. Og sjúkrahússtjórin sær fyri sær, at hetta er ein trupulleiki, sum saktans kann blíva viðkomandi eisini frameftir.



*Sjúkrahússtjórin, Allan Skaalum, er eisini ørkymlaður um, at ongin søkir leysu avloysarastørvini, og at medisinsku deildirnar tí noyðast at minka so nógv um virksemi í feriutíðini*

Fyribils mugu fólk so rokna við einari longdari bíðitíð, og starvsfólkamangulin ger eisini, at frítíðin verður avgreidd yvir eitt longri tíðarskeið enn vanligt.

Trupulleikar hava eisini verið at útvega ljósmøður sum avloysarar, men tað hevur kortini eydnast at nøkta hendan tørvin.

Sjúkrahússtjórin sigur, at hesin trupulleikin við manglandi arbeiðsmegi á Landssjúkrahúsinum ikki er nakað eindømi.

- Sama trupulleika hava smærru donsku sjúkrahúsini, sum vit vanliga meta okkum við, sigur Allan Skaalum.

### Okkurt má gerast

Sjúkrahússtjórin dugur ikki at siga, hví tað júst í ár er vorðin ein mangul upp á frítíðaravloysarar. Vanliga fáa tey fólk úr Føroyum inn, eins og fleiri føroyingar, sum lesa niðri, fegnir nýta ein part av summarfrítíðini at arbeiða í. Hartil koma eisini nakrir útlendingar, fyri tað mesta danir, ið somuleiðis fegnir koma hendanvegin nakrar mánaðir.

- Men spurningurin er, um vit ikki mugu hyggja nærri at okkara útbúgvingarskipan. Serliga, um talið á næmingunum, sum vit útbúgva, er nøktandi. Tað tekur jú langa tíð frá tí at ein persónur byrjar at lesa til lækna, til hann er útbúgvin yvirlækni, sigur Allan Skaalum.

Tað er heldur eingin loyna, at arbeiðsviðurskiftini kundu verið betri, bæði hvat arbeiðstíðum og løn viðvíkur. Sjúkrahússtjórin nemur tí við møguleikan, um vit ikki áttu at gjørt tað meiri hugaligt at útbúgvi seg innan heilsuverkið.

Í onkrum førum hava tey verið noydd at nýta vikarstovur fyri at fáa fólk, men hetta er ein sera dýr loysn. Men okkurt má gerast fyri at halda eitt nøktandi støði, og so má bara vónast, at ein loysn fæst á tørvinum á starvsfólki til sjúkrahúsini.